# Starvsfólk til goymsluna

**Goymslan**

Søkt verður eftir einum starvsfólki til goymslu okkara á Hálsi í Tórshavn at byrja 1. august ella skjótast møguligt.

Á goymsluni starvast 6 fólk og høvuðs-uppgávurnar eru: vørumóttøka, skráseting, prísjavnan, tollavgreiðsla, frakt og vøruútflýggjan og annars alt vanligt goymsluarbeiði.

Tann, sum settur verður, skal fyrst og fremst fáast við toll- og fraktavgreiðslu, men má eisini rokna við at skula taka sær av øðrum uppgávum á goymsluni.

**Tín førleiki:**
Tú skal hava útbúgving sum goymslufólk, skrivstovufólk ella hava royndir í arbeiði við toll og frakt. Dentur verður lagdur á, at tann sum settur verður, kann arbeiða sjálvstøðugt.

**Eisini er fyrimunur um tú hevur**
- royndir við edv (á brúkarastøði)
- góðan røkjuskap
- góð samstarvsevni

Kunnleiki til enskt er ein fortreyt.

Lønin verður sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Føroya Tele.

Gjøllari upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran á Goymsluni, Heina Mikkelsen á tlf. 303030 lok. 3224.

Umsóknir við hjáløgdum prógvum og CV skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 21. juni 2000 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Att.: Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 · Fax 30 30 31 · www.tele.fo
*Føroya Tele er skrásett hjánavn hjá P/F Telefonverkið · Reg. no. 2697*

SANSIR · TEL 355 355


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3012

**Navn:** Sp/f Faroe Offshore Consult
**Adressa:** v/ Hans Paula í Horni, 360 Sandavágur.

**Kommuna:** Sandavágs Kommuna
**Stovningardato:** 25.05.2000
**Vi›tøkudato:** 25.05.2000
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Hans Pauli í Horni, 360 Sandavágur.
**Stjórn:** Hans Pauli í Horni, 360 Sandavágur.
**Tekningarreglur:** Felagi› ver›ur tekna› av einum stjóra.
**Grannsko›ari:** : Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 25.05.2000 - 31.12.2000
**Endamál:** Endamál felagsins er at veita tænastur og rá›geving innan oljuvinnu, ídna›, shipping, handil og anna› starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 6. juni 2000

Kristin Balle


## Bakaralærlingur

Vit søkja eftir einum lærlingi at byrja skjótast gjørligt. Áhugað kunnu venda sær til:

**Tlf. 44 43 88** ella **22 02 30**

BREYÐMOLIN
FO-530 Fuglafjørður. Tlf./Fax. 44 43 88



## Neyst í Havn

Vegna Føroya Skiftirætt verður eitt neyst í Álakeri og gamalt 5-mannafar við hesum lýst til sølu.

Neystið stendur á leigaðum øki næst við innara oljutangan hjá Statoil. Neystið er 8,5 m langt og 2,8 m breitt (mált innan).

Skiftirætturin tilskilar sær rætt at velja millum innkomnu tilboðini ella ikki at taka av nøkrum.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til

**Advokatskrivstovuna**
**Fr. Petersensgøta 9**
Att: Fríða Patursson, adv.

Halgir Winther Poulsen, adv. Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv. Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv. Niels Winther Poulsen, adv.

**Tlf. 311145**



## Grundskeið í AUTOCAD
## 26.–28. juni 2000

Skeiðið er fyri fólk, sum hava áhuga at arbeiða við Auto-Cad.

| | |
|---|---|
| Undirvíst verður í: | Teknikomandoum, Utplotning, Auto-Cad og interneti og Linkmøguleikum |
| Skeiðleiðarar: | Erik Hansen, Århus Tekniski Skúli |
| Skeiðkostn.: | kr. 3.500,00 (skal gjaldast við tilmelding) |
| Tilmelding: | **áðrenn 15. juni 2000** |

**Luttakarar, ið hava goldið í eftirútbúgvingargrunnin »VITAN«, kunnu søkja um stuðul haðani.**

Fráboðan um luttøku og nærri frágreiðing (eisini um innivist v.m.), fæst við at venda sær til skúlan á tlf. 311957 (mánadag–fríggjadag kl. 8–12 & 13–16).

**Tekniski Skúlin í Tórshavn**
Marknagilsvegur 75 • Boks 239
FO-110 Tórshavn



## TØKK TIL ØLL TEY, SUM STUÐLAÐU NORÐOYAR VANLUKKUGRUNNI TIL BINGO 01.06.2000. INN KOMU KR. 26.450,75

| | |
|---|---|
| M/S ÅGOT | ELLA PETERSEN |
| GULLHORNIÐ | NOOMI NIELSEN |
| NORÐOYA GASSØLA | KEMILUX |
| BINGO IMPORT | POUL HANSEN HEILSØLA |
| ÅGOT POULSEN | SOSIALURIN |
| HJÁ NOOMI | THOMAS DAM |
| KARL ANDREASEN | Á HÁLSI |
| BJARNHILD Í BÚÐ | BYGDARFELAGIÐ BÁRAN |

Góðu tit hjartans tøkk øll somul, til tykkum sum vóru á bingo, og tit sum vildu vera ónevnd, vit ynskja tykkum alt tað besta við Guðs Signing.

Við bestu heilsan

Nevndin,
NORÐOYA VANLUKKUGRUNNUR

Sosialurin - 311820



## Til sølu

Sprossavindeygu og úthurðar úr pommernskari furu, kjarnatræi, sproytmálað hvítt og v/ aluminiumsglaslistum allan vegin runt.

| | | | |
|---|---|---|---|
| 90 x 120 v/ 2 rammum | 3 rútar í hvørjari, | 7 stk. | kr. 24.500,00 |
| 133 x 120 v/ 3 rammum | 3 rútar í hvørjari, | 2 stk. | kr. 10.600,00 |
| 47 x 120 v/ 1 rammu v/ | 3 rútum | 2 stk. | kr. 3.960,00 |
| 133 x 60 v/ 3 rammum | 1 rútur í hvørjari | 2 stk. | kr. 4.400,00 |
| 90 x 60 v/ 2 rammum | 1 rútur í hvørjari | 1 stk. | kr. 1.650,00 |
| 47 x 120 v/ 1 rammu | 3 rútar í hvørjari | 1 stk. | kr. 1.980,00 |

Úthurðar 1 stk. h-út og 1 stk. v.-út, 90 x 205
ein v/ fiskabeinsmynstri og ein sløtt kr. 13.600,00

Íalt ........................................................ Kr. 60.690,00

**Ring tlf. 21 71 56**



**Bahá'í samfelagið í Tórshavn**

**Miðstøðin í Gundadali**

Opið hvørt fríggjakvøld.
Samkoma kl. 20

»Kjarni trúarinnar eru fá orð og ovurnøgd av gerðum…«

Bahá'i skriftir
www.bci.org/bahai.fo





## Hjúnastevnur í Zarepta

Hjúnastevnur verða í Zarepta í døgunum 08.–10.09. og 15.–17.09.2000

Tekning í Zarepta, tlf. 332140





## Verkfrøðingur

Tórshavnar havn søkir eftir verkfrøðingi til at standa fyri teknisku umsitingini av bryggjum, bygningum o.ø. ognum hjá havnini eins o.ø. fyrireikandi og umsitandi arbeiði.

Roknað verður við at umsøkjarin hevur royndir innan bygging/eftirlit/projektering, at hann kann samskifta á enskum og hevur kunnleika til EDV.

Umsøkjarin skal hava lætt við at samskifta, kunna arbeiða sjálvstøðugt, vera røkin og hava vilja til at søkja nýggja vitan.

Tórshavna havn kann bjóða eitt sjálvstøðugt og spennandi starv við nógvum avbjóðingum fyri framman.

Løn sambært sáttmála.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Tórshavnar havn.

Umsóknir saman við skjølum og møguligum viðmælum skulu sendast til

**Tórshavnar havn**
**Postboks 103**
**110 Tórshavn**

í seinasta lagi 16. juni 2000.



NORÐOYA SPARIKASSI

# Frítíðaravloysari

**Norðoya Sparikassi søkir eftir frítíðaravloysara at byrja skjótast gjørligt**

Starvið er á høvuðsskrivstovuni í Klaksvík, men kann eisini umfata deildirnar við Klaksvíks- og Stangavegin.

Starvið fevnir um allar vanligar sparikassaavgreiðslur, samskifti við viðskiftafólk og annað viðkomandi sparikassavirksemi.

Starvið ynskist sett skjótast gjørligt. Starvstíðin verður galdandi til 1. september 2000.

Vilt tú vita meiri um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til starvsfólkadeild sparikassan, telefon 456538 lokal 58 ella 456366.

Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvum og møguligum ummæli skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin 14. juni 2000 kl. 16.00. Bústaðurin er nevndur niðanfyri.

Norðoya Sparikassi er stovnaður 24. september 1919, og er ein sjálvstøðugur lokalur peningastovnur, hvørs høvuðsøki eru Norðoyggjar og Leirvík.
Høvuðsskrivstova og tvær deildir eru í Klaksvík. Harumframt eru deildir í Norðdepli, á Viðareiði og í Leirvík.
Norðoya Sparikassi hevur altíð verið peningastovnur løntakaranna, og vil vera tað framyvir.
Harumframt hevur sparikassin seinru árini eisini fíggjað ein part av vinnulívinum.
Norðoya Sparikassi leggur stóran dent á at viðvirka til menning og framburð í sínum virkisøki, og at vera ein hollur ráðgevi við skjótari og góðari tænastu og trygdini í hásæti.
Í løtuni starvast 35 fólk í Norðoya Sparikassa.

*Starvsfólkadeildin, Postboks 149, Ósáveg. 1, FO-700 Klaksvík,*
*Tlf. 456366, Fax 456761, Teldupostur:ns@ns.fo, Heimasíða:www.ns.fo*

GRAFISKT DESIGN 457171



# Betri svøvn

## BIOflex magnetviðgerð tí:

- BIOflex magnetviðgerðin er avgjørt tann besta magnetviðgerðin í verðini!
- BIOflex hevur prógvað ávirkanina við dupultari blindtest!
- BIOflex hevur 100 ferðir størri ávirkan enn líknandi vørur!
- BIOflex er góðkent sum heilsuútgerð!
- BIOflex hevur víst, at yvir 92 % verða pínufrí og øll sova betri!

Vøran er testað á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn.

**Ring 21 79 16**

Magnetviðgerð er tað nýggjasta innan pínuviðgerð - og júst BIO flex undirdýnan, sum er vard við einkarrætti í allari verðini, hevur víst, at 92 % verða pínufrí.
Vello Føroyar veitir tær aftursendingarrætt í 5 vikur, tá dýnan hevur verið brúkt í minst 3 vikur.



**Viðgerð, ið virkar ímóti:**
- Øllum slagi av pínu
- Vøddastívleika
- Trupulleikum við svøvni
- Órógv í blóðrenslinum
- Einastandandi fyri ryggjatrupulleikar

**BIOflex® MAGNET TERAPI**

Vello Skandinavia Sp/f hevur síðani 1989 selt fleiri enn 25.000 BIOflex viðgerðir í Danmark og virkið hevur framhaldandi framgongd við viðgerðini. BIOflex er best á marknaðinum innan magnetiska viðgerð.

Nærri upplýsingar ella faldari fæst hjá: **Vello Føroyar**
Boks 354 - FO-700 Klaksvík • Tlf: 217916 - Fax: 457916

Sosialurin - 311820





## Aðalfundur

Aðalfundurin hjá Eiðis Arbeiðsmannafelag verður í matarhøllini á Norðís 24/6 kl. 19.30.

Skrá sambært lógum felagsins.

**Nevndin**



## LÆRARAR
## skúlaárið 2000/2001

Søkt verður eftir lærarum fyri skúlaárið 2000/2001.

1 fulltíðarstarv
1 sjúkravikar 15 tímar
1 starv 20 tímar frá 21. august til 19. november

Talan er um vanligar lærugreinir í 1.–10. fl. Tó hava lærarar, sum kunnu undirvísa í týskum, fyrimun.

Størvini, sum eru tíðaravmarkað, verða lønt sambært galdandi avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 til 27.4

Umsóknir til størvini skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi 20. juni 2000.

**Skúlanevndin í Nes Kommunu**
v/ Elin Ó. á Torkilsheyggi
655 Nes



## Frá Havnar Handverkarafelag

***Broytt skrivstovutíð***

Skrivstovan er nú opin soleiðis:
**mánadag til og við fríggjadag**
**kl. 09.00–12.00 og**
**hósdag seinnapart frá kl. 15.00–18.00**

Telefon 311548 · Telefax 319548
(telefonsvarari tekur ímóti boðum,
tá eingin er á skrivstovuni)